Landsfundur Miðfloksins:

# Skulu hava andakt og fírskúlar

**Miðflokkurin fer komandi tingsetu at skjóta upp broytingar í fólkaskúlalógini, so fírskúlar kunnu setast á stovn og verandi skúlar kunnu halda andaktir**

LANDSFUNDUR
*John Johannessen*

Næmingar skulu kunna halda andakt og bøn í skúlunum.

Hetta er Miðflokkurin sannførdur um, og tað ætlar hann sær at virka fyri.

Tí ætlar Miðflokkurin sær komandi tingsetu at leggja fram uppskot um broytingar í fólkaskúlalógini, so hesin rættur kann tryggjast. Eisini skal lógin tryggja rættin til at seta fírskúlar á stovn.

– Sum er, sýta flestu skúlar fyri, at næmingarnir halda bøn og andakt í skúlanum. Men eg haldi tað vera óskiljandi, hvørjar grundgevingar kunnu vera fyri slíkum, og hvat tað er, ið skúlarnir óttast, sigur Jenis av Rana í formansfrágreiðing síni frá landsfundi Miðfloksins.

Seinna broytingin, Miðflokkurin fer at mæla til, er, at tað skal vera møguligt at seta fírskúlar á stovn á jøvnum føti við núverandi sólkaskúlar og við sama stuðuli, sum vanligu fólkaskúlarnir fáa.

Landsfundur Miðfloksins:

# Á varðhaldi móti ”kynsvillum”

Miðflokkurin ætlar sær framhaldandi at vera á varðhaldi móti samkyntum – ella ”kynsvillum”, sum formaður floksins kallar hesi í formansfrágreiðing síni.

Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, greiddi á landsfundinum leygardagin frá, at hann sum limur í grundlógarnevndini í oktober fekk eina ”ótespiliga” áheitan frá einum av forsprákarunum hjá teimum ”kynsvillu”.

– Í hesi áheitan hótti forsprákarin beinleiðis grundlógarnevndarlimir. Hann gjørdi greitt, at taka limirnir ikki viðurskifti teirra við sum sjálvstøðugt mál í komandi grundlógini, fara tey kynsvillu at seta tiltøk í verk móti Føroyum, bæði her heima og uttanlands, segði Jenis av Rana í formansfrágreiðing síni.

Formaður Miðfloksins gjørdi greitt, at her er enn eitt mál, ið krevur ein flokk, ið er á varðhaldi, sum krevur eitt mál, og sum torir at standa við hetta, hvat tað enn kostar.

Landsfundur Miðfloksins:

# Tingfólk ræðast Føroya Banka

Uppskot Miðfloksins um at veita teimum endurgjald, ið vórðu rakt av kreppuni tíðliga í nítiárunum fall í tinginum fríggjadagin. Orsøkina heldur Miðflokkurin vera, at tingfólk ræðast Føroya Banka.

– Tað er spell, at tingfólk eftir øllum at døma ræðast Føroya Banka so mikið, ella føla seg so nógv tengd at honum, at tey vísa bankanum loyalitet, heldur enn at hjálpa borgarum sínum, segði Jenis av Rana í formansfrágreiðingini á landsfundinum leygardagin.

Formaður Miðfloksins ætlar sær í komandi tingsetu aftur at royna seg við at leggja eitt uppskot fyri tingið um at veita teimum endurgjald, sum fóru á húsagang, mistu ogn sína og standa eftir við skuld, tí Føroya Banki skuldi bjargast. Nýggja uppskotið skal vera meira nágreinað, enn tað, sum fall fríggjadagin, sigur Jenis av Rana.

Landsfundur Miðfloksins:

# Miðflokkurin stuðlar fullveldisgongdini

**Hóast eitt sindur av kjaki um meira ell minni fullveldi, samdist landsfundur Miðfloksins leygardagin at stuðla landsstýrinum í fullveldistilgongdini**

LANDSFUNDUR
*John Johannessen*



*Miðflokkurin fer framhaldandi at stuðla samgonguni í fullveldistilgongdini. Limirnir í Miðflokkinum lýsa seg sjálv sum frelst fullveldisfólk*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

– Vit eru frelst fullveldisfólk.

Soleiðis lýsti ein av limunum í Miðflokkinum limir floksins í sambandi við orðaskiftið um fullveldistilgongdina á landsfundinum leygardagin.

Onkur av fundarluttakarunum hevði hug at ivast eina løtu, um tað var rætt av Jenisi av Rana at stuðla landsstýrinum fult út í fullveldisstríðnum.

Men fundurin samdist kortini skjótt um, at Jenis av Rana ber seg rætt at í aktuella politikkinum í sambandi við stríðið fyri føroyskum fullveldi. Hóast onkur einstakur hevði hug at ivast, var stórur meiriluti av fundarluttakarunum samdur um, at limirnir í Miðflokkinum eru frelst fullveldisfólk.

### Í tráð við stevnuskránna

Jenis av Rana vísti fundinum á, at fult samsvar er millum nýggjastu fullveldisætlanina hjá landsstýrinum og stevnuskrá Miðfloksins.

Grein 4 í stevnuskránni hjá Miðflokkinum ljóðar soleiðis:

»Í øllum spurningum og avgerðum eigur føroyska tjóðin at hava fullan avgerðarrætt og fulla ábyrgd av landsins stýri. Undirgrundin verður at yvirtaka sum føroyskt sermál«.

Og grein 5 ljóðar soleiðis:

»Stuðulsveitingin úr danska statskassanum skal minkast í mun til fíggjar- og búskaparvøkstur landsins«

Alt hetta heldur Miðflokkurin vera uppfylt í nýggjastu fullveldisætlanini hjá landsstýrinum. Men ásannandi, at føroyska tjóðin ikki alt fyri eitt fær fullan avgerðarrætt og fulla ábyrgd, varð mælt til, at orðingin í grein 4 verður broytt soleiðis, at tað standur, at Miðflokkurin vil arbeiða fyri, at føroyska tjóðin fær fullan avgerðarrætt og so fram vegis.

### ES í stríð við fullveldið

Formaður Miðfloksins brúkti nógva tíð á landsfundinum at greiða frá, hvussu stóra andsøgn, hann heldur vera ímillum fullveldispolitikkin hjá samgonguni og arbeiði hennara at knýta Føroyar tættari og tættari ES. Jenis av Rana vísti millum annað á, hvussu drúgv tíð er farin seinastu tingsetuna til at viðgera og seta í gildi ES lógir í Føroyum, sum spakuliga draga okkum inn í ES.

Hesum var fundurin fullkomiliga samdur við formanninum í. Og tí álegði fundurin Jenisi av Rana áhaldandi at gera vart við vandan við ES og at vísa á andsøgnina í at loysa frá Danmark fyri at binda seg at ES.

Landsfundur Miðfloksins:

# Føroyar eru væl á veg inn í ES

**Miðflokkurin sær tað sum eina stóra uppgávu at fáa fólk at síggja vandan í, at vit spakuliga nærkast limaskapi í ES**

LANDSFUNDUR
*John Johannessen*

Í løtuni nærkast vit áhaldandi ES limaskapi, og áðrenn vit varnast, eru vit limir.

Hetta er limirnir í Miðflokkinum samdir um. Tí samdist flokkurin á landsfundi í Havn leygardagin, at tað er neyðugt, at flokkurin roynir enn meira at fáa fólk at síggja vandan við ES.

– Fólk tykjast ikki at leggja merki til vandan, sum gondir fram móti hesum ófræsla felagsskapi hevur við sær. Tað er tí ein stór uppgáva hjá okkum øllum at greiða frá og fáa fólk at síggja hendan vandan, segði Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, í formansfrágreiðing síni.

### Royna at koma uppí

Jenis av Rana vísti í formansfrágreiðing síni á, at tey málini, sum seinastu tíðina hava kravt nógva arbeiðsorku og tíð í tinginum, eru lógarbroytingar, sum hava samband við ES. Í hesum sambandi vísir Jenis av Rana á djórasjúkulógina, Schengen og veterinera samstarvið.

– Eftir mínum tykki, eru hetta lógarbroytingar, sum landsstýrið hevur sett fram við tí fyri eygað at knýta Føroyar nærri ES, segði Jenis av Rana.

Formaður Miðfloksins heldur mótstríð vera ímillum fullveldisætlanina hjá landsstýrinum og arbeiðið við at seta í gildi ES lógir í Føroyum.

– Eg havi fleiri ferðir gjørt tjóðveldisfólk varug við, at talan veruliga er um mótsagnir. Tí samstundis, sum man hevur sagt seg vilja virka fyri frælsi frá ríkisfelagsskapinum, so hevur man við hond og fót stríðst fyri at seta púra óneyðugar ES-lógir í gildi í Føroyum, segði Jenis av Rana, formaður, á landsfundinum.

### Danir bjargaðu frá evruni

Jenis av Rana heldur, at føroyskir politikarar eru púra eiðasørir fyri visiónir og ideoligiir. Tí heldur hann, at vit í dag høvdu havt evruna sum gjaldoyra, um danir ikki tóku um endan og atkvøddu ímóti, at evran skuldi gerast danskt gjaldoyra.

– Tað er nú einaferð so, at danir eru so fittir, at teir ofta bjarga okkum, heldur Jenis av Rana.



# Hava fingið útgerðina og skulu nú eisini hava fólkið

OLJUVERND
*Áki Bertholdsen*



*Bjargingarfelagið í Suðuroyar norðaru helvt hevur nú fingið útgerð at basa oljudálking við útgerðin kom heim við Brimli seinasta leygardag. Her er tað Bergur Stórhamar, formaður í bjargingarfelagnum, sum skoðar útgerðina*

– Nú útgerðin er komin, verður tað eisini neyðugt at fáa eina fasta skipan fyri, hvussu hon skal brúkast. Og tann skipanin skal verða klár tann dagin, brúk verður fyri útgerðini.

Sum vit greiddu frá í Sosialinum leygardagin , hevur Bjargingarfelagið í Suðuroyar norðaru helvt í Suðuroynni gingið útgerð til at basa oljudálking á sjónum við.

Pauli Einarsson á Tvøroyri, sum hevur verið ein av undangongumonnunum at fáa útgerðina til landið, sigur, at nú vónar hann at tað eisini ber til at fáa eitt skilagott samstarv, so at útgerðin kemur til so stóra nyttu sum gjørligt.

– Vit skulu hava eina tilbúgving undir øllum umstøðum. Nú hava vit hesa útgerðina, so er tað óneyðugt hjá øðrum feløgum at útvega sær sama slag útgerð. Tey kunnu heldur leggja á onkran annan bógv, tí at hava fleiri av hvørjum verður ov dýrt.

Pauli Einarsson sigur, at sjálvsagt stendur útgerðin, sum tey nú hava keypt í Suðuroyar norðaru helvt øllum feløgunum til taks.

– Men skulu vit gera eina landstilbúgving, krevur tað eitt størri tiltak. So mugu fastar skipanir gerast um, hvør skal arbeiða við útgerðini. Eitt nú skal fólk lærast at brúka útgerðina og onkur skal røkja og halda hana.

– Tað ber ikki til at dúvva upp á sjálvbodna arbeiðskraft í tí týdningi, at alt arbeiðið skal vera ókeypis. Tá ið brúk er fyri útgerðini, kann tað verða í fleiri dagar og tað ber ikki til hjá fólki at leggja arbeiðið niður í fleiri dagar fyri at taka eitt sjálvboðið upp fyri einki.

– Og hesar skipanir skulu helst vera greiðar, tann dagin, brúk er fyri útgerðini, sigur Pauli Einarsson.

Hann sigur, at eitt nú vónar hann, at Bjargingarfelagið í Suðuroyar norðaru helvt kann verða eitt slag av entreprenøri hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, so at Vaktar- og Bjargingartænastan keypir tænastuna frá bjargingarfelagnum.

– Ein máti kundi verið, at vit fingu eitt samstarv við Vaktar- og Bjargingartænastuna um, at bjargingarfelagið lærdi fólk at brúka útgerðina og at hesi fólkini so altíð vóru til reiðar, um okkurt skuldi blivið áfatt.

– Hendir eitt óhapp, ber tað ikki til bara at senda útgerðina avstað, tí onkur má vera við, sum dugir at brúka hana, sigur Pauli Einarsson

